# 50 ár innan skúlans gátt

Dagfinnur Danbjørg, lærari, 50 ár innan skúlans gátt tann 1. okt 2009.



Dagfinnur Danbjørg er føddur í Porkeri tann 9. juli 1943, sonur hin navnframa læraran og løgtingsmannin Johan Hendrik Danbjørg.

Dagfinnur fór í realskúla í Vági sum bert 11 ára gamal í 1955, og har tók hann realprógv 15 ára gamal í apríl 1959. Í sama mánaði fór hann sum messudrongur við Tjaldrinum og var við nevnda skipi til á Ólavsøku. Fyrst í august fór hann á royndarfiskiskap í Eysturgrønlandi við Karin K og teimum 10 bátunum, ið fylgdu við.

Sjálvur var Dagfinnur við 29 tonsaranum Mathildu úr Leirvík: Teir sigldu vandasjógv og vóru m.a. sperraðir inni í ísinum og vóru nærum skrúvaðir niður, og hartil vóru teir illa fyri á heimferðini við stórum leka í himmalsins ódnarveðri.

Heimkomin í oktober 1959 fekk hann starv sum læraravikarur á Stóru Dímun frá 1. oktober - 1. apríl 1960. Síðani hevði hann sama starv í 3 ár aftrat til apríl 1963. Summarhálvárini var hann til sjós, har hann m.a. fiskaði við loddi og teini við tveimum húkum og lippukassa við Johannu á Eysturlandinum, við Saksaberg til ísfisk og við Havgásini á sildaveiðu.

Í mai 1961 fór hann „jómfrútúrin" við Porkerningi - fyrsta stálbygda skipi í Føroyum - ein snellutúr í Vesturgrønlandi. Í 1962 var hann bæði vártúrin og summartúrin í Vesturgrønlandi við sama skipi– tann fyrra við línu, og tann seinna við snellu.

Í 1963 fór Dagfinnur „jomfrútúrin" við Porkerisnesi, ið varð liðugtbygdur sum triðja stállínuskip á Tórshavnar Skipasmiðju.

Dagfinnur var ein av mongum, sum átti í hesum stásiliga skipi. Teir royndu fyrsta túrin við snellu í Vesturgrønlandi. Heimkomin fyrst í september fekk Dagfinnur starv sum læraravikarur í Tjørnuvík.

Í september árið eftir fór hann til Jútlands á háskúla í Støvring, og í 1965 varð hann upptikin á Holbæk Seminarium, har hann fekk læraraprógv í juni 1969. Í juli sama árið giftist hann við einum floksfelaga, og við henni eigur hann tveir synir: Carl Johan, sum er føddur í 1970, og Johan Henrik, sum er føddur í 1973. Av somu orsøk var hann verandi í Danmark til 1982.

Í 1969 gjørdist Dagfinnur lærari í Nyborg - fyrst 1 ár við kommunalu skúlarnar og síðani við „Nyborg private realskole" frá 1970 - 1982.

Dagfinnur fekk skjótt fleiri álitisstørv á realskúlanum í Nyborg.

Dagfinnur var næstformaður og skrivari í lærararáðsnevndini, hann gjørdist skemaleggjari, praktikkleiðari og skúlavegleiðari, men brádliga verður hann hart raktur av sjúku, og tá hann samstundis verður fráskildur, setur hann kósina heimaftur, sum hann av fyrstan tíð hevði ætlað sær.

Dagfinnur fær starv í Fuglafirði á sumri í 1982, har hann starvast við sama lag, men skeiðið er við at vera at enda komið, tí hann fellur fyri aldursmarkinum í juli komandi ár.

Í Fuglafirði hevur Dagfinnur kent seg sera væl, ella sum hann ofta tekur til: „sum ein fisk í vatninum". Allar tær funktiónir, sum hann áður hevði, hevur hann tikið upp aftur í Fuglafirði. Hann hevur m. a. verið lærararáðsformaður í 7 ár, hann hevur verið álitismaður í Føroya Lærarafelag, hann hevur verið skemaleggjari øll árini síðani 1985 og til í fjør. Eisini hevur hann verið starvspraktikkleiðari í mong Harrans ár – eins og hann hevur verið skúlavegleiðari síðani tað starvið var sett á stovn.

Í 1996 giftist Dagfinnur á øðrum sinni við Magdu – einum starvsfelaga - og saman eiga tey sonin Johan Magnus, sum er teirra eitt og alt.

Dagfinnur er væl kendur fyri sína luttøku í samfelagskjakinum, men av tí, at hann ofta verður sensureraður fyri lítið og lætt, tá tað ikki hóvar teimum ráðandi at hoyra beinriknan kritik frá einum ektaðum sosialisti, so hevur hann í ein vissan mun valt at stinga pípuna inn í seinastuni.

Eg veit, at tað eru mong børn, ið hava verið og eru glað fyri, at tey hava lært Dagfinn at kenna, og at tey seta stóran prís uppá tað, hann lærdi tey. - Hetta er ikki minst komið til sjóndar, tá ið næmingar í 10. flokki so mangan hava heiðrað Dagfinn við minnisgávum.

Sum starvsfelagi havi eg alt gott at bera Dagfinni. Hann er sera gløggur og vitandi. Hann dugir so avbera væl at nýta hesi evni, so tað í so mong ár hevur verið øllum á skúlanum til gagns og framburð.

Rættvísi og solaridetur er hornasteinurin í øllum hansara virki, og hann torir at tala at, tá ið órættur verður framdur, og ikki minst, tá ið hin veiki verður fyri mismuni. Hann er avbera góður í ráðum og ger altíð stóran mun, har hann er staddur.

Góði Dagfinnur! Eg vil á henda hátt ynskja tær, Magdu og Jóhan Magnusi mong góða ár saman. Stóra takk fyri gott vinalag!

**Vinur**


Her fæst Sosialurin



Sosialurin – altíð við tí nýggjastu og feskastu tíðindunum

Vilt tú hava feskastu tíðindini?

– so er besta loysnin at keypa Sosialin



Sosialurin fæst í leysasølu kring alt landið. Bara í Suðuroynni eru 11 handlar, har tú kanst keypa Sosialin.

Verð við! Les Sosialin!

Sølustøð í Suðuroy...

- J.D.Hammer Tvøroyri
- Tangabúðin Tvøroyri
- Bakarí Gaard Tvøroyri
- Statoilstøðin Tvøroyri
- FK Trongisvágur
- Bakkhús Hvalba
- Statoil støðin Vágur
- D.J.Vilhelm Vágur
- Shell Støðin Vágur
- Í Toftum Vágur
- Signar Olsen Porkeri

Eisini ber til at halda Sosialin fyri kr. 475,- um ársfjórðingin

Ja takk! Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposta. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn